SERNÁMSDEPILIN

## Ráðgevandi ergo-/ ella fysioterapeutur

Í Sernámsdeplinum er eitt hálvtíðarstarv sum ráðgevandi ergo-/ fysioterapeutur til setan 1. september 2008 ella skjótast til ber leyst at søkja.

Tó verður ynskt, at tann, ið sett/ settur verður, kortini kann arbeiða ¾ tíð hetta ár at enda. Møguliga kunnu umstøður gera, at ¾ arbeiðstíðin kann halda fram til 30. juni 2009. Miðjað verður eftir, at starvið kann gerast fulltíðarstarv, sum frá líður.

**Arbeiðsstað**
Setanin er í Sernámsdeplinum í Tórshavn, men er arbeiðsøkið kanning og ráðgeving viðv. børnum og ungum ( 0-18 ár ) kring alt landið.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan er í greiningararbeiði at skipa fyri rørsluligum kanningum av børnum og at luttaka í eygleiðing av børnum, ið eru undir kanning. At veita ráðgeving til stovnar, foreldur og tey, ið annars eru um børnini, ið hava rørsluligar - og sansaskipanar trupulleikar. Ein minni partur kann vera viðgerandi venjing. Arbeitt verður í samstarvi við HTM og Barnadeildina á LSH.

**Førleikakrav**
Útbúgvin ergo- ella fysioterapeutur. Fyrimun hevur umsøkjari við eftirútbúgving og/ ella royndum at kanna smábørn við serligum atliti til sansamenning.

**Løn og arbeiðstíð**
Eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Arbeiðstíð, frítíð o.a. verður løgd til rættis í samráð við stjóran í Sernámsdeplinum.

Meira fæst at vita við at venda sær til Emmy Joensen, settur stjóri – Sernámsdepilin tlf. 314522 ( kl. 10 – 12 )

Umsókn við avriti av próvskjølum og møg. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi tann 18. august 2008.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
E – postur: sernamsdepilin@snd.fo

## Starv á Fróðskaparsetri Føroya

### Lektari í samfelagsfrøði

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í samfelagsfrøði leyst at søkja. Starvið verður sett sum lektarastarv, og tann ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í samfelagsfrøði á deildini.

**Starvsøki:**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um at hava ábyrgd av útbúgvingini í samfelagsfrøði og at undirvísa. Tann, ið settur verður, skal eisini vera við til at endurskoða núverandi B.S.Sc.- útbúgving í stjórnmálafrøði, áðrenn studentar verða tiknir upp til nýtt nám at byrja á heysti 2009.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving sum stjórnmálafrøðingur ella líknandi frøðigrein hava granskaraútbúgving á Ph.d. stigi og undirvísingarroyndir.

Við umsóknum skulu fylgja avrit av vísindaligum avrikum í trimum eintøkum, eins og umsøkjarar skulu lýsa undirvísingarroyndir sínar.

Sett verður metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Starvið verður at seta 1. oktober 2008.
Umsóknarfreistin er **11. august 2008.**

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, telefon 352583/226495, elinsj@setur.fo ella til Beintu í Jákupsstovu, telefon 352582, beinta@setur.fo. Upplýsingar um virksemi á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**

***FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA***
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

Runavíkar Kommuna

## Leiðari til Dagstovnin í Skálafirði

Dagstovnurin í Skálafirði heldur til í leigaðum í hølum hjá Kelduni í Skálafirði. Har er stutt til fjøru, sand, á og haga.

Á dagstovninum eru 2 vøggustovur við 12 børnum í hvørjari. 10 Starvsfólk arbeiða á stovninum, tey flestu við niðursettum arbeiðsbrøki.

**Søkt verður eftir:**
Námsfrøðingi at byrja 1. sept., ella eftir nærri avtalu, sum leiðari á Dagstovninum í Skálafirði.

Runavíkar kommuna hevur tikið stig til at byggja nýggjan barnagarð í Søldarfirði og á Skála og er ætlanin at leiðarin flytir við á annan av nýggju stovnunum.

**Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Harumframt hevur hann ábyrgd av:**
- at stovnurin er í støðugari menning,
- at starvsfólk trívast og mennast,
- at tað støðugt verður arbeitt við at menna námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og út frá teimum fortreytum sum stovnurin virkar undir.
- At samstarva við kommunalu umsitingina, við aðrar leiðarar innan barnaansingina og við aðrar viðkomandi stovnar

**Vit leita eftir leiðara, ið er**
- útbúgvin námsfrøðingur
- er førur fyri at skera ígjøgnum og taka avgerðir
- er nýhugsandi og ígongdsetandi
- hevur góð samstarvsevni
- evnar at eggja og menna starvsfólkið
- hevur góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- hevur telduførleika á brúkarastøði

Er eingin útbúgvin pedagogur millum umsøkjararnar, kann fólk við aðrari viðkomandi útbúgving verða sett í starvið.

**Vit bjóða**
- eitt sjálvstøðugt starv við avbjóðingum
- eitt mennandi umhvørvi, har tað er møguleiki er at fáa ráðgeving og hjálp

**Setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Leiðarin hevur tilvísing til sosialdeildarleiðaran hjá kommununi.

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 22 64 49.

**Søk starvið**
Við at senda Runavíkar kommunu eina umsókn í seinasta lagi 15. august 2008, kl. 12:00.

**Runavíkar Kommuna**
**Sosiala deild**
Postboks 139 · Heiðavegur 26 · FO-610 Saltangará

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 sovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**

# BINDIBÚÐIN

**Starvsfólk til Bindibúðina í SMS!**

Søkt verður eftur starvsfólki til farloyvi 30 tímar um vikuna.

Hevur tú hug at arbeiða hjá okkum?

Tú ert kreativur, smílandi, kundarvinarligur, álítandi og fyrikomandi.

Hevur hetta tín áhuga, kann tú seta teg í samband við Eyð Skoubo, tel.315566 / 515566

Umsóknin skal vera okkum í hendi **innan 10.aug.**

Lesið Sosialin -so eru tit við!